# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Føðingar

15. september fingu Angilie og Jan Olsen, Tvøroyri, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 3470 gr.

18. september fingu Frederike Hammerstein Jóanesarson og Høgni Sundstein Jóanesarson ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 3400 gr. og hevur fingið navnið Béla Marius Jóanesarson. Tey eru búsitandi í Paris.

19. september fingu Jenny Winther Poulsen og Mortan Zachariassen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 4000 gr.

21. september fingu Jakoba Bech og Jaspur Bjartalíð, Svínoy, ein son. Hann var 50 cm. langur og vigaði 3150 gr.

21. september fingu Sólbjørg Kærbech og Halgir Poulsen, Porkeri, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2980 gr.

22. september fingu Mirjam Heinsen og Jógvan Heinesen, Viðareiði, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4400 gr.

23. september fingu Beinta Johannessen og Allan Dalsgarð, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

23. september fingu Óluva og Anfinn Højgaard, Rituvík, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3450 gr.

23. september fingu Jenny Johannessen og Hjalti Bjørgheim Rasmussen, Klaksvík, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4350 gr.

23. september fingu Jórun og Absalon Wolles, Eiði, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3650 gr.

23. september fingu Katrin Hoydal og Einar Brimnes, Velbastaður, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4100 gr.

24. september fingu Sára Skaalum og Þorgrimur Einarsson, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 2970 gr.

24. september fingu Gerda Nattestad og Hjalti Petersen, Esbjerg, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4300 gr.

24. september fingu Sólfríð S. Rasmussen og Gert Heinesen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3550 gr.

25. september fingu Linda Joensen og Emil Johansen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3200 gr.

27. september fingu Mariann Reinert og Rúni Vesturklett, Fredriksberg, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 4200 gr.

27. september fingu Jenny Petersen og Magnus Samuelsen, Funningur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3750 gr.

## Rætting

Rætting til grein í blaðnum fríggjadagin 30. september 2005 á síðu 39 "Heilsa & lívsstílur".

Í brotinum "Viðvíkjandi at motionera er boðskapurin, at vit við at røra okkum ein tíma um dagin, skal tað standa hálvan tíma. Endamálið er nevniliga, at okkum nýtist ikki at íðka so nógv, men bert ein hálvan um dagin.

**Sosialurin**



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Dvørgarnir og Snjóhvíta á Læraraskúlanum

**Í komandi viku fara 3. árs pedagoglesandi á Føroya Læraraskúla at framføra barnaleikin Dvørgarnir og Snjóhvíta fyri barnagarðsbørnum og skúlabørnum í 1. 2. og 3. flokki**

LEIKUR

3. árs pedagognæmingar á Føroya Lærarskúla hava sent innbjóðingar til dagstovnar og skúlar kring alt landið. Leikurin, ið er um Snóhvítu og dvørgarnar, byggir á ævintýrið hjá brøðrunum Grimm, men við fleiri nýggjum hugskotum.

Endamálið við leikinum er at geva børnum í Føroyum eina góða uppliving og eisini at menna hugflogið hjá børnum og vaksnum. Vit halda eisini,at tað er umráðandi at geva børnunum eitt sansaligt upplivilsi. Her í Føroyum hava vit tíverri alt ov lítð av leikum av slíkum slagi til børn, siga pedagognæmingarnir.

Næmingarnir hava sjálvir sett leikin upp. Leikurin er ein sameining av lærugreinunum: smíð, evning, hondarbeiði, tónleik og drama. Leikstjóri er Lillian Geisler, lærari í drama á Føroya Læraraskúla.

Sýningarnar fyri dagstovnar og skúlar verða frá mánadegi 3. oktober til og við fríggjadagin 7. oktober. Tríggjar sýningar verða um dagin: kl. 9.00, kl. 11.00 og kl. 13, tó er ætlanin av hava eina almenna sýning hóskvøldið kl. 19.00.

Heystting við evninum

## Loysn á basaltknútinum? - fyribils úrslit frá Sindri

**Oljutingið bjóðar til heystting 5. oktober 2005 kl. 19.00 á Sjómansskúlanum**

*Ein av stórstu avbjóðingunum oljufeløgini eru komin fram á í Føroyum, er hvussu ein kann síggja ígjøgnum basalt fláirnar sum fevna um ein stóran part av føroyska landgrunninum. Eisini er tað tungt at bora ígjøgnum basalt tí tað er so hart. Hesar báðar avbjóðingarnar vera nevndar basaltknúturin.*

Lars Beksgaard, formaður í Sindri kemur at greiða frá arbeiðnum Sindri hevur staðið fyri, fyri at loysa basaltknútin. Eisini kemur Lars Beksgaard at tosa um framtíðarætlanir hjá Sindri.

Kl. 19.00 Vælkomin
Kl. 19.15 Formaðurin setur Oljutingið
Kl. 19.20 Matur og drekka
Kl. 20.30 Lars Beksgaard røðar um evni:
*Loysn á basaltknútinum? - fyribils úrslit frá Sindri*
Kl. 21.15 Spurningar frá áhoyrarum
Kl. 21.30 Liðugt

***Sindri stuðlar tiltakinum.***

Vinarliga boða Vinnuhúsinum frá luttøku á telefon 309900 ella umvegis teldupost: industry@industry.fo í seinasta lagi týsdagin 4. oktober.

Vælkomin

Vinaliga
Oljutingið

OLJUTINGIÐ

Sosialurin 341800